# Venjari í ein dyst

Í næstseinasta umfari av týsku landskappingini tapti Bielefeld 6-0, og tað fekk venjaran at gevast, hóast bert ein dystur var eftir at spæla. Jörg Berger tók við leiðsluni, men tað eydnaðist honum ikki at vinna seinasta dystin, og tí flutti Bielefeld niður úr Bundesliguni. Og Berger hevur ikki hug at halda fram sum venjari hjá Bielefeld.



# Meistarar nýggjan venjara

Leygardagin vann týska felagið Wolfsburg sítt fyrsta meistaraheiti nakrantíð, men tað er greitt, at venjarin hjá liðnum, Felix Magath, heldur ikki fram. Hann fer til Schalke 04 at starvast. Nýggjur venjari hjá týsku meistarunum verður Armin Veh, sum í 2007 vann meistaraheitið í Týsklandi saman við Stuttgart.

**Støðan, 1.deild menn**

| | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 FC Hoyvík | 9 | 6 | - | 1 | - | 2 | 14 | 10 | 4 | 19 |
| 2 HB | 9 | 5 | - | 2 | - | 2 | 20 | 11 | 9 | 17 |
| 3 TB | 9 | 5 | - | 2 | - | 2 | 15 | 13 | 2 | 17 |
| 4 B68 | 9 | 5 | - | 1 | - | 3 | 22 | 13 | 9 | 16 |
| 5 B71 | 9 | 5 | - | 1 | - | 3 | 18 | 11 | 7 | 16 |
| 6 VB/Sumba | 9 | 4 | - | 2 | - | 3 | 20 | 18 | 2 | 14 |
| 7 NSÍ | 9 | 3 | - | 1 | - | 5 | 14 | 20 | -6 | 10 |
| 8 Skála | 9 | 2 | - | 2 | - | 5 | 9 | 15 | -6 | 8 |
| 9 Víkingur | 9 | 1 | - | 4 | - | 4 | 7 | 10 | -3 | 7 |
| 10 MB | 9 | 0 | - | 2 | - | 7 | 8 | 26 | -18 | 2 |

leikssteðginum, tí spælararnir vóru næstan bláfrystir av kulda, men tann møguleikin var av ongum, tá Christian Mouritsen legði HB á odda 2-1 við beinleiðis frísparki. So gjørdist lítið annað enn at spæla víðari, hóast flestu umstøður talaðu ímóti tí, og tá nú veðrið hevði so nógv at siga, bøtti tað kanska um rættvísið at Andrass Mikkelsen í seinna hálvleiki fekk javnað fyri Víking við góðum langskoti.

### B71-NSÍ 3-1

Eftir fyrstu tveir dystirnar í ár sá einki út hjá niðurflytarunum í B71, men leygardagin fingu teir sætta sigurin í sjey teimum síðstu dystunum, tá næstbesta manningin hjá NSÍ var á vitjan á vøllinum við Meginskúlan. Og tað vóru gestirnir sjálvir, ið settu heimaliðið í gongd, tá ein av teimum var so óheppin at beina bóltin í egið mál.

Clayton Soares økti síðani til 2-0, áðrenn ein av veteranunum hjá NSÍ, Sjúrður Jacobsen, fyri hálvleik vísti, at hann framvegis hevur sparkiteknikkin intaktan, tá hann við beinleiðis frísparki minkaði um munin. Tað munaði kortini ikki heilt, tí eftir steðgin kom bara eittans málið, og tí syrgdi Símin Hansen fyri, tá hann skoraði triðja málið hjá B71, sum sostatt vann 3-1.

### Skála-TB 2-0

Heldur ikki hitt niðurflutta liðið, Skála, hevði nakra ynskiliga byrjan á landskappingina, men tapti fyrstu fýra dystirnar. Skála er framvegis triðniðast, men blaðunga liðið tekur seg støðugt fram og megnar eisini at geva onkrum av favorittunum ein frammaná.

Tað fekk TB at kenna leygardagin, tí eftir ein málleysan fyrra hálvleik fekk Skála tvey mál í seinna hálvleiki, uttan at TB nakrantíð fekk svarað aftur. Petur Pauli Michelsen skoraði til 1-0 eftir hornaspark, og síðani økti Steffan Fredriksberg, tá hann var spældur av Sjúrði Djurhuus, ið sjálvur var farin allan vegin.

Talan var tó um ein javnan dyst, har Skála hevði vindin undan í fyrra hálvleiki og TB í seinna. Og hóast TB hevur nógv fleiri royndar spælarar á sínum liði, vóru tað teir ungu á Skála, sum megnaðu at fáa nakað burtur úr møguleikunum og tí vunnu fyri aðru ferð í ár.

### MB-FC Hoyvík 1-3 (0-1)

Í Miðvági hittust uppflytararnir báðir. Í fjør vann Fram 2. deild, men felagið er umskipað og eitur nú FC Hoyvík, meðan MB framvegis eitur tað sama, felagið hevur itið í væl yvir 100 ár. Veðrið í Miðvági leygardagin var fínt undan dystinum og eisini aftaná, men vindurin darvaði júst um tað mundið, tá dysturin var spældur.

FC Hoyvík hevði munin í fyrra hálvleiki og kom eisini á odda 1-0 við máli, sum spælandi venjarin, Helgi L. Petersen, syrgdi fyri. Fleiri mál komu ikki í fyrra hálvleiki, og eftir steðgin vann MB sær eitt yvirtak og Ingi W. Joensen javnaði eisini til 1-1. Men tá Finn Mørk legði FC Hoyvík á odda 2-1 við brotssparki, tá eitt stórt korter var eftir, ressaðust gestirnir aftur og staðfestu sigurin við enn einum máli, sum Allan Michelsen skoraði.



*Her skorar Wolfsburg-framherjin, Edin Dzeko, málið í dystinum ímóti Werder Bremen leygardagin, ið gjørdi hann og Grafite til besta álopsparið í týskum fótbólti nakrantíð*

*Mynd: David Hecker/Scanpix*

# Fólkavognsfelagið meistari

**Wolfsburg vann seinnapartin leygardagin sítt fyrsta meistaraheiti nakrantíð. Wolfsburg hølvaði Werder Bremen av í seinasta dystinum, sum gjørdi enda á einum gomlum meti í týskum fótbólti**

FÓTBÓLTUR
*Hilmar Jan Hansen*
*einslistir@kallnet.fo*

Wolfsburg hevur sum býur eina rættiliga stutta søgu. Býurin var gjørdur til arbeiðsfólk hjá Volkswagen fyri seinna heimsbardaga, og framvegis snýr nógv seg um VW, sum hevur verksmiðju og høvuðssæti í býnum.

Leygardagin vann fótbóltsfelagið í býnum sítt fyrsta meistaraheiti nakrantíð. Wolfsburg spældi á heimvølli ímóti Werder Bremaen og skuldi hava í minst lagi javnleik fyri at halda stórfelagið Bayern München aftan fyri seg. Og Wolfsburg læt ongan iva verða um úrslitið, tí felagið vann heili 5-1 á Werder Bremen.

Úrslitið í sjálvum sær var ikki so nógv at siga til, men har var so nógv annað, ið gjørdi júst henda dystin søguligan og serligan. Ikki minst tað, at eitt gamalt met í týskum fótbólti stóð fyri falli.

### 54 mál tilsamans

Tá Christian Gentner spældi Edin Dzeko leysan, so hann kundi skora til endaliga úrslitið, tá eitt korter var eftir, var tað endin á gamla metinum, sum álopsparið, Gerd Müller og Uli Hoeness høvdu átt síðani í 70-unum.

Legendarisku framherjarnir í Bayern München skoraðu í bæði 1972 og 1973 tilsamans 53 mál, men Edin Dzeko og Grafite syrgdu við sínum málum leygardagin fyri, at teir báðir tilsamans komu upp á 54 mál, og so er tað metið altso sett av nýggjum.

– Bæði metið og meistaraheitið kennast heilt ótrúlig, staðfesti Dzeko, sum saman við Grafite mannar helst hitt vandamiklasta álopsparið í Europa í mong ár.

At hetta metið so var tikið, samstundis sum Wolfsburg fyrstu ferð nakrantíð toppaði ovastu rók í týsku Bundesliguni, gjørdi tað til ein sera, sera stóran dag í »fólkavognsbýnum«.

– Hetta er ein dreymur, sum er gingin út. Undan kappingarárinum hugsaði eg ikki tankan, at vit skuldu hava møguleikan at vinna gull, segði venjarin, Felix Magath.

– Men so vil eg eisini siga, at vit hava uppiborið meistaraheitið, soleiðis sum vit hava spælt hetta kappingarárið.

### Magath heiðurin

Flestu eru á einum máli um, at tað ikki minst er takkað veri Magath, at Wolfsburg er meistari, tí hesi tvey árini í venjarastólinum hevur hann mestsum gjørt eitt undurverk fyri og annað eftir. Tá hann tók við, at var felagið líka við at flyta niður, men nú er annað lagið.

– Eg rokni við, at Wolfsburg fer at kappast um gullið í framtíðini eisini. Vit hava sett saman eitt ungt og svangt lið við ótrúligum møguleikum. Hetta verður ringt at fara frá, segði Felix Magath, sum longu frammanundan vísti, at hann fór at gevast, tí hann næsta ár skal venja Schalke 04.

Meðan eftirmaður hansara skal leiða Wolfsburg út í Champions League í heyst, endaði nýggi arbeiðsgevari hansara á einum áttandaplássi, sum ikki gevur atgongd til europeiskar dystir.

Hini bæði týsku liðini í komandi Champions League-kappingini verða Bayern München og Stuttgart, men síðstnevnda noyðist fyrst ígjøgnum undankappingina.

Hertha Berlin hevði møguleika fyri at taka plássið frá Stuttgart, men snávaði ímóti Karlsruhe, sum longu er flutt niður. Tí má Hertha Berlin taka til takkar við einum plássi í Europa League, eins og Hamburg. Karlsruhe fer niður í 2. Bundesligu saman við Armina Bielefeldt, meðan Cottbus sleppur at spæla um upp- og niðurflyting.